# Landsbankin slær seymin á høvdið

**BÚSKAPUR** - Seinasta frágreiðing Landsbankans sigur tað, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur víst á og ávarað ímóti. Almennu útreiðslurnar eru eksploderaðar, og nú verður rokningin send vinnuni, skrivar Vinnuhúsið

Eirikur Lindenskov

Í seinastu frágreiðingini frá Landsbankanum verður víst á, at grundraksturin í landskassanum frá ár 2000 til 2010 er versnaður við 1.350 mió kr. Í sama tíðarskeiði eru inntøkurnar vaksnar við 660 mió. kr. Útreiðslurnar eru sostatt vaksnar heilar tvær milliardir.

- Staðfestingin av, at almennu útreiðslurnar eru vaksnar við stórari ferð í Føroyum og við munandi størri ferð enn í grannalondunum, er sera ørkymlandi. Tíverri akkurát tað, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur víst á ferð aftan á ferð í sambandi við uppskot um tiltikna ólavsøkupakkan og viðgerðina av fíggjarkørmunum fyrr í ár, har lagt verður upp til at leggja alt fleiri avgjøld á vinnuna, skrivar Vinnuhúsið í morgun.

Vinnuhúsið sigur, at hetta sýnist at verða einasti mátin landsstýrið sær ein møguleika at útvega inntøkur og sostatt eitt frægari úrslit á fíggjarlógini.

- Politiski viljin til at gera átøk, sum kunnu minka um almennu útreiðslurnar er ikki til staðar. Tosað verður um reformar og sparingar í almenna rakstrinum, men hetta eru bert orð. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at politiskar raðfestingar mangla, sigur Vinnuhúsið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at reformar skulu til, sum geva neyðugu rationaliseringina av almenna rakstrinum.

- Her verður m.a. hugsað um tað ótal av stovnum, sum eru, har fá fólk starvast. Hesir eiga at verða samanlagdir, og fíggjarorkan raðfest til tey økir, har tørvur er. Átøk eru neyðug, sum krevja umleggingar og politiskar semjur fyri at finna loysnir, sum hóska til okkara lítla land og fíggjarorku.

Grundað á tær útmeldingar, sum hava verið frá politisku skipanini seinastu tíðina og út frá tí, sum var lagt fram í sambandi við viðgerð av fíggjarkarminum fyrri 2011, hevur vinnan tíverri ikki annað í væntu enn somu tilgongd, sum vit hava sæð seinnu árini.


*Marita Rasmussen er stjóri í Vinnuhúsinum*

- Rokningin fyri útreiðsluvøksturin verður sendur vinnuni, skrivar Vinnuhúsið.

*eirikur@sosialurin.fo*

## *Ung dansa føroyskan dans í Dali*

Fríggjakvøldið 3. og leygardagin 4. september skipar Sláið Ring fyri stevnuni Ung í dansi 2010. Stevnan er fyri ungfólk í aldrinum 13 - 17 ár. Onnur ung , sum hava hug at luttaka, men sum eru farin upp um aldursmarkið, eru vælkomin at melda seg til sum hjálparleiðarar.

Í ár verður stevnan hildin í Eiriksgarði í Dali. Dalur er gomul dansibygd og hevur Eiriksgarður eitt framúr gott dansigólv, so umstøðurnar skuldu verið tær bestu.

Stevnan byrjar fríggjakvøldið við nátturða. Eftir nátturðan verður almennur dansur, har ungu luttakararnir sleppa at dansa saman við dansufeløgunum í Sandoynni, Stígum Fast og Leikum Fagurt og øðrum, ið leggja leiðina framvið.

Leygarmorgunin er dansur og læra á skránni. Evnið á stevnuni hesaferð er dansisiðir. Vilhelmina Larsen, ið hevur fingið dansin inn við móðurmjólkini í Skálavík, greiðir frá um góðan dansisið. Eisini kemur Rasmus Joensen, formaður í Sláið Ring, at greiða frá dansisiði í sambandi við brúðardans.

Seinnapartin er ein útferð á skránni. Tiltakið endar við at luttakararnir sleppa at uppliva roykstovumentanina, sum hon var fyri hundrað árum síðani. Tey koma at luttaka á eini kvøldsetu har rokkurin gongur í takt við kvæðini, har karðarnir klórast og stokkarnir ringla. Alt meðan greitt verður frá gomlum døgum, og gomul føroysk barnaspøl verða víst fram. Teir luttakarar, ið hava hug, sleppa eisini sjálvir at royna seg.

Stevnan er ókeypis og luttakararnir fáa ferðaseðilin endurgoldnan. Hetta verður gjørt fyri at ung úr øllum landinum skulu hava møguleika at luttaka uttan kostna.

Skráin fyri tiltakið og onnur kunning liggur á heimasíðuni hjá Sláið Ring. www.sr.fo

## Í MORGIN

**8/11 °C**



6-11 m/s 6-11 m/s

Gul til stívt andøvsgul av norði og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin milllum 8 og 11 stig.

## MIKUDAGIN

**8/11 °C**



3-8 m/s 5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur av norði. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.

## HÓSDAGIN

**7/10 °C**



4-9 m/s 4-9 m/s

Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin upp í stívt andøvsgul av norði og útnyrðingi, leygardagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av norði. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 10 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1000 hPa. vestan fyri Hebridurnar fer spakuliga eystureftir og dýpist. Brúgvalagið norðan fyri Føroyar fer suðureftir.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Hebridurnar grynnist og brúgvalagið við Føroyar fer suðureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 83 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

24. august Fullmáni
25. august Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. aug. | 06:36 | 18:57 | 05:36 | 17:57 | 05:51 | 18:12 | 08:36 | 20:57 | 09:36 | 21:57 | 04:51 | 17:12 | 03:51 | 16:12 | 06:51 | 19:12 | 07:51 | 20:12 | 06:21 | 18:42 | 07:36 | 19:57 |
| 24. aug. | 07:18 | 19:37 | 06:18 | 18:37 | 06:33 | 18:52 | 09:18 | 21:37 | 10:18 | 22:37 | 05:33 | 17:52 | 04:33 | 16:52 | 07:33 | 19:52 | 08:33 | 20:52 | 07:03 | 19:22 | 08:18 | 20:37 |
| 25. aug. | 07:56 | 20:13 | 06:56 | 19:13 | 07:11 | 19:28 | 09:56 | 22:13 | 10:56 | 23:13 | 06:11 | 18:28 | 05:11 | 17:28 | 08:11 | 20:28 | 09:11 | 21:28 | 07:41 | 19:58 | 08:56 | 21:13 |
| 26. aug. | 08:30 | 20:47 | 07:30 | 19:47 | 07:45 | 20:02 | 10:30 | 22:47 | 11:30 | 23:47 | 06:45 | 19:02 | 05:45 | 18:02 | 08:45 | 21:02 | 09:45 | 22:02 | 08:15 | 20:32 | 09:30 | 21:47 |
| 27. aug. | 09:05 | 21:22 | 08:05 | 20:22 | 08:20 | 20:37 | 11:05 | 23:22 | - | 12:05 | 07:20 | 19:37 | 06:20 | 18:37 | 09:20 | 21:37 | 10:20 | 22:37 | 08:50 | 21:07 | 10:05 | 22:22 |